umhvørvisstovan

# KUNNGERÐ

## um uttangarðsútskiftingar-fund við Gjógv

Eftir løgtingslóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund

**hósdagin 26. juni 2008 kl. 10.00**

í bygdarhúsinum við Gjógv.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum **Fyri oman Rætt.**

**Nevndarlimir eru:**
Marita í Brekkunum, Hósvík
Jákup Skoradal, Norðoyri

N.v.

Arnold Thomassen
útsk.form.

umhvørvisstovan

# KUNNGERÐ

## um uttangarðsútskiftingar-fund í Húsavík

Eftir løgtingslóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund

**týsdagin 24. juni 2008 kl. 10.00**

í Ungmannafelgashúsinum í Húsavík.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum **Innarihagi, Eystaripartur.**

**Nevndarlimir eru:**
Marita í Brekkunum, Hósvík
Jákup Skoradal, Norðoyri

N.v.

Arnold Thomassen
útsk.form.

Sosialurin Sosialurin i Sosialurin Sosialurin

TJÓÐPALLUR FØROYA

## Skrivstovustarv

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Tjóðpall Føroya. Vit kunnu bjóða eitt arbeiðspláss við sál, har hvørt starvsfólk hevur sín týdningamikla leiklut í uppgávuni at geva áskoðarum spennandi og avbjóðandi upplivingar á høgum listarligum stigi.

**Starvið**
Talan er um hálvtíðarstarv við setan frá 1. september 2008 ella skjótast til ber.

**Starvið fevnir í høvuðsheitinum um**
· telefon og postavgreiðsla
· bókhald
· skrivarauppgávur
· annað fyrifallandi arbeiði

**Førleiki**
Best er við skrivstovuútbúgving og -royndum, størst týdning hevur tað tó, at tú:
· hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
· ert stinn/ur í føroyskum
· hevur góð evni at samskifta og samstarva við onnur
· hevur góðan teldukunnleika

**Lønar og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og lønt samsvarandi 3. flokki.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jenny C. Petersen, stjóra, á tel. 228086 ella á grima@post.olivant.fo

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum, cv og møguligum viðmælum skulu vera Tjóðpallinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni 2008.

**Umsóknir skulu sendast til:**
**Tjóðpall Føroya**
Tórsgøtu 9
Postrúm 212
110 Tórshavn

# Sørvágs skúli

Skúlavegur 13 . FO-380 Sørvágur
Tlf. 36 32 22 & 23 32 22
Fax 36 32 21 · sor@skulin.fo

## Lærarastørv í Sørvágs skúla

**Søkt verður eftir:**
1 lærara í fast starv.

3 lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2008/09 vegna farloyvi, barnsburðarfarloyvi, niðursettum tímatali, til serligan tørv og til avlopstímar

1 lærara í tíðaravmarkað starv frá 1. august til 16. desember 2008 vegna barnsburðarfarloyvi

Okkum tørvar lærarar, sum kunnu undirvísa í: Føroyskum, Støddfrøði, Náttúru og tøkni, Dreingjaítrótti og Evning

**Førleikakrøv:** Lærarаútbúgving og linjulestur í viðkomandi lærugreinum.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 – 27.4

**Nærri kunning** um størvini fáast við at ringja til Andrass Henriksen, skúlastjóra, á tel. 363222 ella 233222, ella Eyð Niclasen, varaskúlastjóra, á tel. 223670

**Umsóknir** við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi **í seinasta lagi 20. juni 2008 kl.12.**

Í Sørvágs skúla eru 145 næmingar í 1. til 10. flokki. 16 lærarar starvast í skúlanum. Frá skúlabyrjan 2008/09 hava lærarar skúlans fyrireikingarhøli við egnum skrivi-borði og egnari farteldu.

# INNBJÓÐING

**Felagið Føroysk Verkætlanarleiðsla skipar fyri evnisdegi í samstarvi við DONG Energy.**

Í sambandi við vitjan frá danska orkufelagnum DONG Energy bjóðar FVL til evnisdag um verkætlanarleiðslu mánadagin 16. juni frá kl. 13.00 til kl. 16.30 á Hotel Hafnia, Parnassinum.

Evnisdagurin er ætlaður bæði almennu umsitingini og vinnulívinum, men vendir sær serliga til fólk við ábyrgd fyri verkætlanum, og annars teimum, ið hava áhuga.

**Um DONG Energy**
Eftir samanlegging millum DONG, Elsam, E2, Nesa, Københavns Energi og Frederiksberg Energi varð orkufelagið DONG Energy skipað, og eitt felags modell var ment til verkætlanarleiðslu, ið fevnir um stórar sum smáar verkætlanir í felagnum.

Ein røð av einfaldum amboðum, ið eru løtt at brúka, eru tøk, umframt brúkaravegleiðingar og fyrimyndir, ið stuðla tilgongdini.

Samtíðis er ein innanhýsis útbúgving ment fyri verkætlanarleiðarum og áhugaðum.

**Evnisdagurin**
Bjarne Bojsen leiðari av koncernprojektdeildini í DONG Energy fer at:
• greiða frá teirra innanhýsis verkætlanarbygnaði og royndum við nevnda modellinum
• at vísa á, hvussu DONG handfer minni verkætlanir og hvørji stýringsamboð verða nýtt
• greiða frá útbúgvingini

Tilmelding fer fram við at gjalda luttøkugjaldið á konto felagsins, sum er 9181 1484534. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri limir og 500 kr. fyri ikki limir.

**Øll eru vælkomin!**

Føroysk Verkætlanarleiðsla
Partur av Dansk Projektledelse







## Bátar til ein hvønn tørv

**Les meira á www.meklarin.fo**

**HP. MARINE · SP/F RÚNAR**
Túnagøta 1 · 600 Saltangará
tlf. 219450 · fax 449191 · hpe@kallnet.fo